Ivan Johansen Bilar:

# Ivan Johansen Bilar hevur opið í vikuskiftinum

**Í samband við at fleiri nýggj snið eru komin er opið hjá Ivan Johansen Bilum í vikuskiftinum, bæði leygardagin og sunnudagin. Nýggju sniðini eru øll á goymslu og møguleiki er sjálvandi at royna tey**

TÍÐINDASKRIV

Hetta er ein spennandi tíð, bæði so og so. Hjá Ivan Johansen Bilum kunnu vit bjóða fleiri nýggj snið fram. Bæði frá Mitsubishi og Citroén er møguleiki at síggja, royna og sjálvandi keypa nýggju sniðini.

### Citróen

Bilarnir frá Citroén hava altíð sett sín sermerkta dám á ferðsluna. Nýggjasta skotið er nýggi C5.

Vit kenna hann - men í nýggjastu útgávuni verður hjúkla um vælumtókta tungvektaran hjá Citroén; sermerkini eru fleiri og koyrieginleikin liggur heldur ikki eftir. Tað er eingin loyna at Citroén væntar sær nógv av nýggja C5.

### Mitsubishi

Bíða hevur verið eftir Mitsubishi eina tíð - gitingarnar hava verið fleiri hvat vælumtókta verksmiðjan nú fór at borðreiða við. Í heyst kom so tann nógv saknaði Mitsubishi Colt, ein bilur sum hýsur tí sum kritikarin vil hava og sum hevur útsjóndina við sær. Nógvir Coltar hava koyrt á føroysku vegunum gjøgnum ár og dag, og í dag er avloysarin klárur at taka yvir.

Mitsubishi Grandis er ein kollveltandi nýggjaheit frá Mitsubishi og hesin finnur valla sín líka í sínari støðd. Bilurin rúmar 7 fólkum og er - í mun til Coltin ikki sæddur á føroysku vegunum áður.

Tað er avgjørt við spenningi og dirvi at Mitsubishi bjóðar sínum kundum eina slíka útgávu, og sjálvandi eiga vit føroyingar eisini fáa høvi at ogna okkum ein Mitsubishi Grandis.

### …og nógv onnur góð tilboð

Annars eru fleiri góð tilboð og fleiri góðir brúktir bilar á sølulistanum, umframt aðrir nýggjir bilar.

Sí lýsing aðrastaðni í blaðnum.

*Opið er leygardagin 13. nov. 14 - 16*
*Og sunnudagin 14. nov. 14 - 17*

## Stór jólagospel konsert

TÍÐINDASKRIV

Tann 18. desembur klokkan 20.00, verður stór jólagospel konsert í ítráttarhøllini á Hálsi.

Nøkur av kendastu nøvnunum, her hjá okkum, fara at spæla, eitt nú Heine Lutzen, Anna D. Háberg, song-bólkurin, SALT, Creedo og onnur.

Eisini fer Dramabólkurin úr Klaksvík at framføra drama.

Á konsertini verður nakað fyri allar aldursbólkar, og kostnaðurin verður 50 krónur fyri børn og 100 krónur fyri vaksin.

Umframt sang, tónleik og drama, verður eisini skipað fyri hugnaligari Café, har okkurt verður at fáa til matna.

Tað er Margarinfabrikkin, sum tekur stig til og samskipar jólagospel konsertina.

# – Vit eru tey einastu sum renna eftir seyði

**- Eg haldi ikki, at eg taki munnin ov fullan, tá eg sigi, at norðingar halda lítið um hund. Hetta kemst av tí einføldu orsøk, at vit vita ikki, hvat ein góður hundur er og hvat dugur er í honum, verður hann rætt vandur, sigur Jákup Jacobsen í Haraldsundi, sum á øðrum sinni skipar fyri seyðahundavenjaraskeiði**

SEYÐAHUNDAR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*– Vit mugu bara síggj í eyguni, at norðingar hava ikki góðar hundar. Vit koma ikki víðari, fyrrenn vit hava góðtikið hetta sjálvi. Tað ræður um hjá okkum at hyggja at, hvussu aðrir handfara og venja hundar sínar, Jákup Jacobsen í Haraldsundi, sum er ein av stigtakarunum til eitt seyðahundavenjingarskeið*

*Mynd: Victor Dánjalsson*

Føroyingar eru helst teir einastu, sum enn renna og tuska eftir seyði í fjøllunum. Aðrastaðni brúka tey hund, hest ella tyrlu.

Hetta halda Jákup Jacobsen í Haraldsundi og Tróndur Petersen á Viðareiði verða ov gamaldags, og skipa teir tí á øðrum sinni fyri seyðahundavenjaraskeiði á Viðareiði.

– Vit hava ikki givið okkum nóg væl far um, hvussu dugnaligar hundar vit kunnu fáa, um bert vit venja teir rætt, sigur Jákup. Hann sigur, at neyðugt er at broyta hugburð, tá tað kemur til at reka við hundum.

– Vit mugu bara síggj í eyguni, at norðingar hava ikki góðar hundar. Vit koma ikki víðari, fyrrenn vit hava góðtikið hetta sjálvi. Vit eru øll í sama báti, og tað ræður um hjá okkum at hyggja at, hvussu aðrir handfara og venja hundar sínar.

Tað er Absalon Hansen í Havn, ið verður skeiðleiðari á skeiðnum , sum hann kallar, "Frá hvølpi til unghund".

Skeiðið verður í skúlanum á Viðareiði tann 20. novembur og byrjar klokkan 9 á morgni. Tey, sum hava umstøður til tað, kunnu hava hundar sínar við.

Tey, ið ynskja at tekna seg til skeiðið, skulu ringja á telefon 75 67 87. Freistin at tekna seg er úti 17. novembur klokkan 22.00.

Kostnaðurin fyri skeiðið er 300, 00 krónur, tá er matur íroknaður.

# Vestmanna Sangkór 25 á baki

**Í ár er Vestmanna Sangkór farið um tey 25 árini. Hetta hevur kórið gjørt av at hátíðarhalda við einari jubileumskvøldsetu leygarkvøldið klokkan 17**

HÁTÍÐARHALD
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Vestmanna Sangkór uttan fyri Skt. Magnus Katedralin í Orknoyggjum í 1991, frá einum av mongu uttanlandsferðunum hjá kórinum*

Kvøldsetan, sum verður í auluni í Vestmanna skúla leygardagin býður upp á eina fjølbroytta skrá. Tað verður ikki bara ein konsert við kórinum, og tískil hava tey valt at kalla tað eina kvøldsetu.

Sjálvandi fer kórið at seta sín dám á, men har verður eisini solosangur, jubileumsrøða og myndir frá øllum hesum 25 kórárunum.

Jubileumsrøðuna fer Jaspur Olsen, ein av teim royndu bassunum í kórunum, og formaður eitt skifti, at halda.

Tað sum kórið fer at syngja, verður sjálvsagt merkt av at tónasmiðjurin Kári Bæk hevur verið kórleiðari hjá Vestmanna Sangkóri tað seinasta og longsta tíðarskeiðið. 4 av kórsatsunum hevur Kári gjørt. Teir eru "Lívligt er á bønum" (orð Mikkjal á Ryggi), "Lækjan" (orð Chr. Matras), "Kavin kom í morgun" (orð Martin Joensen) og "Jarðareygað" (orð T.N. Djurhuus). Aðrir sangir á skránni eru Land mítt har grasið, Vár við lýggjum vindi, Nú seta tey á teymarnar, Skip á Havnini, Tit sum í fjøru fóru, Kom drekkið vínreyða skál, Hvør skuldi gamlar gøtur gloymt, teir báðar svensku Och jungfrun hun går i ringen og Så længe skutan kann gå, og so tann lettiski Put vejini.

Á kvøldsetuni verða so eisini kaffi og kakur afturvið. Øll eru hjartaliga vælkomin til kvøldsetuna.



# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.
tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**Bilur til sølu**
Volvo 240 DL (2458) árg. 88 til sølu fyri 2.000 krónur.Ring og spyr nærri á tlf
*220602*

**TOYOTA COROLLA TIL SØLU**
Árgang 1988. Koyrt 142.500 km. Hevur nýggj heilársdekk
*Tlf. 33 24 72*

**TOYOTA AVENSIS 2.0**
sol aut, árg. 12/99, koyrt 250.000, er í tip top standi, nýsýnaður, fjarstýrt sentrallás, el rútar framman og aftan, autom. gear o.m.a. fyri einans 95.000 kr.
*Tlf. 506565*

**TIL SØLU**
Toyota Corolla til sølu, árgang 1988. Koyrt 142.500 km. Hevur nýggj heilársdekk.
*Tlf. 332472*

**SAAB 900 2.0**
fyri bert 11.500 kr. Bilurin er bláur við 4 hurðum og er frá juli 1989. Í góðum standi. Útgerð: servo, krók, hita í setrum, v.m. Ring ella skriva til
*tlf. 211800, e-post: ingi@kallnet.fo*

**HYUNDAI ELANTRA 1.5 GLI**
árg. 92, nýsýnaður við radio/cd-spælara/box 20.000 kr.
*Tlf. 224910*

**SKODA OCTAVIA TIL SØLU**
Skoda Octavia 1.6i árg. 2001 í góðum standi til sølu.
*Tlf. 422826/223742*

**4 SPORTFELGUR TIL RAV 4**
við óslitnum summardekkum til sølu fyri 7.000 kr. Dekk: Toyota Tranpath A11 (til Rav 4) 235/60 R16. Felgurnar hava 5 boltar.
*Tlf. 226112*

**TIL DAEWOO MATIZ**
4 sportfelgur við góðum summardekkum til sølu fyri 2.000,- kr. Stødd 155/65 R13.
*Tlf. 226112*

**TIL SØLU**
4 píkadekk 185/65-15 brúkt 3 mánaðir, til sølu fyri 2000 kr.
*Tlf. 333138*

**BMW 325i**
E30 til sølu, gráur, hevur el-sóltak og spegl, centrallás, 17" alufelgur og 15" alufelgur við píkadekkum. K & N filtur, remus útstoyt, tokulyktir, 4 hurðar, anlegg.
*Tlf. 332921 áðrenn kl. 17*

**BMW 320 D**
árg. 99, fartlf. fartpilot og radio/cd kann stýrast frá róðrinum. Nýggj diesel pumpa. Vetrardekk á felgum fylgja við.
*Tlf. 227733*

**TOYOTA COROLLA SÆLGES**
Sedan 1.3, árg. 1998, med tuningsboks og KN-filter, hvid, km. 82.000, stået i garage, meget velholdt, kun 70.000 kr. Kontakt
*Tlf. 314952 el. 514952 eft. kl. 18*

**MITSUBISHI JEEPUR**
4 x 4 Pajero, árg. 1988, krevur ábøtur, men koyrir væl, til sølu fyri 12.000,- kr.
*Tlf. 422611/256091 eftir kl. 16*

**TIL SØLU**
Heilársdekk á felgum til Toyota Carina E.
*Tlf. 506725/322068*

**TIL SØ:LU**
Ein Scania 112 við skiftilast til sølu. Kranakonsol aftan. Og ein isolerað asfaltslast. Eisini eitt vippustell til Scania 143 E til sølu. Áhugað kunnu ringja
*225590*

**CITROEN SAXO**
frá mars 2003. Motorur 1.6i sport, 100 HK við fullari útgerð, til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 748039, Dan*

**VOLVO 240**
4 fælger købes. God pris gives, helst letmetal, men stålfælge har også interesse.
*Tlf. 222842*

**NISSAN ALMERA 2.2**
Hatchback, 5 hurðar, diesel, 110 HK, árg. 2000, koyrt 98.000 km, nýsýnaður, el-rútar framman, el-spegl.
*Janus, 225933*

**15'' AEZ FELGUR**
við dekkum, stødd 195/50 R15 til sølu fyri 5.000 kr. Nýprísur 7.000 kr. sum nýggj, bert koyrt 100 km.
*Tlf. 228774*

**TIL SØLU**
Fýra píkadekk, stødd 185/65 R15 á sportfelgum, passa til Toyota Avensis, árg. 2002.
*Tlf. 361364/210364*

**NÝGGJAR**
bilgáttir til Toyota Avensis til sølu.
*Tlf. 212806*

**DAEWOO MUSSU 2.9 TD**
árg. 8. mán 99. Til sølu fyri 140.000 kr.
*Tlf. 508869 ella 332919*

**PEUGEOT 406 2.1 DIESEL**
árg. 12/97, reyður, koyrt 231.000 km, til sølu vegna flyting. Ring og fá meira at vita
*tlf. 443156/264320*

**MAZDA 323 LX**
við 4 hurðum til sølu sum eykalutir. (Kann koyra).
*Tlf. 270427/312981*

**PÍKADEKK**
4 Wredestein píkadekk, 185/65 R14 til sølu fyri 1.500 kr.
*Tlf. 314192*

**PÍKADEKK Á FELGUM**
4 píkadekk á felgum við org. skálum til Honda Civic. Passa eisini til aðrar jap. bilar.
*Tlf. 505562*

**MERCEDES VITO 110 CDI**
vøruvognur, árg. 99 til sølu.
*Tlf. 271777*

**LÍTIL FLOTTUR**
Toyota Yaris 15 T Sport til sølu, árg. 02.
*Tlf. 225785*

**TIL SØLU**
Nýsýnaður Mitsubishi Lancer st.car 1,8 diesel frá 1990. Píkadekk á felgum fylgja við. Kr. 10.000,-
*Tlf 270216*

**JEEPUR TIL SØLU**
Ein eldri Mercedes jeepur, árg. 80, til sølu fyri 10.000 kr.
*Tlf. 252745 eftir kl 16.00*

**EIGUR NAKAR**
skermbreiðkarar til Mitsubishi Pajero, árg. 89 av styttra modellinum at selja mær? Ringi
*Tlf. 213701*

**TIL SØLU**
4 píkadekk á felgum, Dunlop, til Toyota Avensis, stødd 185/65-15 til sølu fyri 2.500 kr.
*Tlf. 212092*

**TIL SØLU**
4 píkadekk á felgum, stødd 195/70-15 til VW Transport til sølu fyri 2.000 kr.
*Tlf. 212092*

**OPEL ASTRA DIESEL**
árg. 1999 við skaða til sølu. Bilurin hevur 2 hurðar.
*Ring 316005/516005*

**TIL SØLU**
Reyður Nissan Sunny, árg. 02/1989. Koyrt 155.000 km. Sýnaður í apr. 2004. Krevur smáar ábøtur. Píkadekk fylgja við. Til sølu fyri 7000 kr.
*Tlf. 220156/210000*

**TOYOTA COROLLA TIL SØLU**
Árg. 1986, til sølu sum eykalutir fyri 3.000 kr. Hevur radio og nýggj píkadekk.
*Tlf. 317414 ella 226315*

**TIL SØLU**
Píkadekk á felgum til sølu, stødd 175/70 R13 fyri 1.500 kr.
*Tlf. 255279*

**TIL SØLU**
4 píkadekk á felgum til VW Passat 1.8 og 4 felgur 13" 4 hol til Charmant.
*Tlf. 424605/227091*

**DEILIR**
til Mazda 626 coupé, árg.89, lyktir, listar o.a. fæst sera bíliga.
*Tlf. 252506*

**TOYOTA LANDCRUISER**
3.0 TD, árg. 12/1997 til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin er nýsýnaður og er lakeraður í 2002. Hann hevur koyrt 140.000 km.
*Tlf. 318460*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
*(set X)* undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ ......................... |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12[00], t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.***

Sent hevur:
Navn:………………………………………..
Bústaður:……………………………………
Bygd/býur:………………………………….
Tlf.: ………...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

## Arbeiði

**FLISEARBEJDE**
Pensionist søger mindre indendørs flisearbejde:
*TLF. 314434 el.22805*

**ARBEIÐI SØKIST**
17-ára gomul genta søkir arbeiði. T.d. ansa eftir børnum heima hjá okkum, eri von at ansa børnum.
*Tlf. 318667/253063*

**BJÁLVA HÚSINI - TAÐ LOYSIR SEG**
Vit bjálva út- og innveggir, skráveggir, millum hæddir og annað mangt. Ringi og biði um tilboð. Vit senda eisini faldara við upplýsingum. Vit koma um alt landið.
*Tlf. 319309 ella 519309*

**ÚTGREVSTUR**
Tilboð verða givin upp á útgraving av grundstykkjum og øðrum. Áhugað kunnu ringja
*225590*

**ARBEIÐI SØKIST**
ca.10-20 tímar um vikuna.
*Tlf. 255024*

**HEY HEY**
Eg eri ein tilkomin álítandi kvinna, sum kundi hugsað mær at arbeitt uml. 2–3 tímar um dagin í einum handli, skóhandli ella okkurt við klæðum í Havn.
*Tlf. 582990*

**27 ÁRA GAMAL MAÐUR**
søkir arbeiði, havi vanligt koyrikort, alt hevur áhuga. Bert Norðoyggjar.
*Tlf. 252506*

**SKULU TIT HAVA**
veitslu, jólaborðhald o.a., so hava vit eina fjølbroytta matskrá, har vit bera út, og kunnu eisini veita servering um tað ynskist. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 504727*

## Barnaútgerð

**TIL SØLU**
Odder tvíburavognur sum er 79 cm breiður til sølu fyri 1800,- kr. Tveir trygdargóðkendir bilstólar av slagnum Mothers Choice upp til 13 kg við vindverju til sølu fyri 400 kr. stk.
*Tlf. 227878*

**VOKSIPOSI/DÝNA**
Svartur Brio Voksiposi/dýna »við plátu/botni« til sølu fyri 800,- kr.
*Tlf. 227878*

**BARNAVOGNUR**
Svartur Brio barnavognur til sølu fyri 1800,- kr.
*Tlf. 227878*

**TIL SØLU**
Ein fráur koyristólur við posa og regnslagi til sølu. Brúktur 1 ár, í sera góðum standi, Ring
*Tlf. 448251*

**KOYRISTÓLUR**
lambsskinn, regnslag, seli, paraply, innkeypsnet til sølu fyri 550,- kr.
*Tlf. 322850*

**BARNASONG**
Næstan nýggj barnasong »Malla«, selist. Songin hevur skrivaraborð, botn , madrassu 200x70x100 cm. Til sølu fyri kr. 800,-
*Tlf. 314302 ella 211800*

**MANGLAR TÚ EINA SLYNGU**
ella kanska ein amme-bh ella eina ammeblusu, so ring á
*tlf. 580098*

**ODDER BARNAVOGNUR**
v/ dýnu og kodda 3.000,- Bilstólur 0-13 kg. 450,- Ferðasong 300,- Babylift Brio 400,-
*Tlf. 321647*

**KOYRISTÓLUR TIL SØLU**
riggar perfekt, bláur við termomadrassu, regnslagi, termoposa, fluguneti. Dýna fylgir eisini við. Alt til sølu fyri 1.100 kr.
*Tlf. 215353*

## Bátaútgerð

**LÍNUBÁTUR TIL SØLU**
Vit hava nakrar stállínubátar við fiskiloyvum til sølu.
*Tlf. 212238/312238*

**MØN FISHERMAN 30**
v/ fiskiloyvi, línuspæli, 4 snellum, egningartrakt, VHF, plottara, radara, ekkoloddi. 165 HK.
*Tlf. 272828/332811*

**PERKINS MOTORUR**
140 HK til sølu.
*Tlf. 312717/226007*

**21' GLASTREVJABÁTUR**
Við 20 HK Buck-motori og fiskiloyvi til sølu.
*Tlf. 221744 ella 217846*

**PLASTJOLLA YNSKIST**
Til keyps. Best um hon er av merkinum Pioner Maxi.
*Tlf. 217421*

**EIN FLÓTIDRAKT**
(yvirlivilsisdrakt) FRC3, 275 N við sjálvuppblásiligum innbygdum bjargingarvesti. Nýprísur ca. 5.00 kr. aldrin brúkt, góð tá tú er á floti, til sølu fyri 4.500 kr.
*Tlf. 264955*

## Bingo

**GOTT BINGO**
verður í Bygdarhúsinum á Strondum leygardagin 20.11.04. Kl. 16.00. Nógvir góðir vinningar so sum Hátrýstreinsari, fleiri gávukort, døgurðamatur, karamellur o.m.a.
*9.A í Stranda Skúla*

**FRÁ HALDÓRSVÍKAR AVHALDSFELAG**
Bingo vcerður í Avhaldshúsinum mikudagin tann 17. nov. kl. 19. Eykaspælið er 1.700 kr.
*Nevndin*

**GOTT BINGO**
Verður í kappróðrarneystinum í Streymnesi mánakvøldið 15. november kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin. Eisini verður bingola spælt.
*H.S.R.*

**GOTT BINGO**
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 22. november kl. 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Eisini verða Gullbingo og Dannebrog spæld. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Glæman*

**GOTT JÓLABINGO**
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 6. desember kl 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli er ein balja full av mati. Eisini verða Gullbingo og Dannebrog spæld. Øll eru hjartaliga vælkomin
*Glæman*

**BARNABINGO**
Gott barnabingo verður 11. desember kl. 15.
*Glæman*

**FRÁ TÓRSHØLL**
Gott bingo verður í Tórshøll leygardagin 13. nov. kl. 20. Millum annað at vinna er ræst krov, gávukort 1000 kr. og nógv annað.
*Tórshøll*

**EB/STREYMUR – RÆSTKJØTA-BINGO**
Verður í Ítróttarhøllini á Eiði sunnudagin 14. nov. kl. 16.00. At vinna verða m.a. 20 røst krov, bókapakkar og ræstur fiskur. 25 vinningar verða burturlutaðir m.a. 5 uttanlandsferðir við Atlantic Airways og røst krov.
*EB/Streymur*

**NISSUBINGO**
Stórt bingo verður í Pálsstovu sunnudagin 21. nov. kl. 16.00. Full pláta: Døgurðapakki til jóla, virði 700 kr. Tó 6. og 12. spæl 1000 kr. Á lutaseðlunum: Heimagjørd nissupør, jólakalendari, tvær dukkur við klæðum, 2 jólakurvar, gás og gávubræv. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Kyndil*

**SUÐUROYINGAR**
Bingo verður í Framtíðini mánadagin 22. nov. kl. 19.00 Høvuðsvinningur á lutaseðli: Apex ferðaseðil. Enskar karamellur burturlutaðar millum nøkur spøl. Eyka-eyka spæl verður.
*Kirkjukórið Ljómur*

**SUÐUROYINGAR!**
Gott bingo verður í skúlahøllini í Trongisvági týskvøldið 16. nov. kl. 19.00. Nógv gott at vinna, 1 rk. ísl.bógvur 2 rk. dunna og bingo verður gávukort á kr. 300,-, à lutaseðli m.a. dunna, før. gás og gávukort á kr. 500.00. Enskar karamellur burturlutaðar millum nøkur spøl og eyka-eyka spæl verður eisini.
*Tvøroyrar Svimjifelag*

**JÓLASTOVAN**
Verður 5. des. og jólabingo 12. des.
*Samljóð*

**GOTT BINGO**
Verður í bygdasalinum á Skála leygardagin 13. nov. kl. 16.00.
*Skála Ítróttafelag*